# Ein fiskilig sensatión

**Í november 2000 fiskaði garnabáturin »Isak L« ein sjáldsaman fisk við Grønland, sum eingin umborð á grønlendska skipinum hevði sæð ella hoyrt um fyrr. Føroyski skiparin Olaf Sólsker tók avgerð um, at fiskurin skuldi frystast heilur og sendast til kanningar. Ikki fyrr enn nú, hálvt triðja ár seinni, hava fiski- og havfrøðingar staðfest, hvat slag fiskurin er av, og er tað onki minni enn ein sensation**



*Her sæst patagoniski tannfiskurin, sum eisini er ein delikatessa í fleiri londum.*
*Mynd: National Geographic*

TÍÐINDI
*Hans Kárason Mikkelsen*

Olaf Sólsker, skipari av Eiði, varð ógvuliga bilsin yvir tann 1,80 m langa og 70 kg tunga fiskin, sum teir á »Isak L« fangaðu henda dagin í november 2000. Mennirnir umborð hugdu í fiskibøkur í einari roynd at staðfesta, hvat slagið varð. Men tað eydnaðist teimum ikki.

Og líka trupult tóktist tað hjá vælútbúnum fiskifrøðingum, tí tað tók teimum meira enn tvey ár at útgreina, hvat slag hesin fiskurin varð. Eftir at langi fiskurin hevði ferðast runt á ymsum hægri lærustovnum og kanningarstovum, m.a. á føroysku Fiskirannsóknarstovuni, varð hann sendur til Peter Rask Møller og hansara menn á Keypmannahavnar Universitet.

Teir komu í februar 2003 fram til, at fiskurin er ein patagoniskur tannfiskur (Dissostichtus eleginoides), sum vanliga er at finna við suðurendan av Suður Ameriku. Hetta stóð at lesa í altjóða tíðarritinum »Nature« tann 6. februar í ár.

Aftaná at tað varð staðfest, hvat slag fiskurin varð, blivu Olaf Sólsker og teir á »Isak L« umrøddir í so kendum altjóða tíðarritum sum »National Geographic« og »Fishing News,« sum er størsta fiskivinnutíðarritið í heiminum. Tað varð nevniliga onki minni enn ein stórhending innanfyri fiskifrøði og í akademiskum sirklum, tí hesin fiskurin er ongantíð fyrr sæddur so norðaliga.

- At finna ein slíkan fisk beint við Grønland er sanniliga sjáldsamt, sigur Thomas Hilbish við »National Geographic.« Hilbish er professari í lívfrøði við New York State University, og hann leggur aftrat, at henda hendingin stuðlar einum vælkendum ástøði um, at fiskar kunnu ferðast í streymbeltum, sum liggja undir heita vatninum í tropunum. Tað er nevniliga sannlíkt, at fiskurin er komin í nakað djúpt vatn, og hann hevur síðani ferðast einsamallur til Grønlands við einum køldum undirstreymi.

Fiskurin trívist annars best, tá hitin er millum 2 og 11 gradir celsius. Tað norðasta man hevur sæð tann patagoniska tannfiskin er í Suðuramerika við strondina uttanfyri Uruguay. – Tað er onki minni enn ein sensatión, sigur Olaf Sólsker, sum tók stig til at fáa fiskin kannaðan.

Spurdur hvussu tað kendist, tá navnið á einum er at finna í fleiri kendum tíðarritum kring heimin, sigur Olaf Sólsker, at tað altíð er stuttligt og spennandi við sovorðnum.

Olaf greiðir at enda frá, hvussu gekk fyri seg tann minniliga dagin: – Beinanvegin fiskurin kom á dekkið, sóu vit, at hetta varð eitt annað fiskaslag, enn vit eru vanir við. Eg tók so stig til at ringja til grønlendsku fiskirannsóknarstovuna, men teir vístu ikki serliga stóran áhuga. Fiskurin kom at enda upp á pláss, sigur Olaf um grønlendsku fiskifrøðingarnar.

Fiskurin endaði í Danmark umvegis føroysku Fiskirannsóknarstovuna. Og tað vóru eisini danir, ið funnu útav, at hetta er ein patagoniskur tannfiskur, sum eisini er ein tann størsti fiskurin av hesum slag, fiskifrøðingar vita av. Ein altjóða fiskilig sensatión við suðuramerikonskum fiski, grønlendskum báti, og føroyskum skipara.

## Friðarligt vikuskiftið í Havn

LØGREGLUTÍÐINDI
*Hans Kárason Mikkelsen*

Løgreglan í Tórshavn hevði ikki nógv at gera um vikuskiftið. Av politistøðini frætta vit, at tveir bilførarar vóru tiknir fyri rúsdrekkakoyring, ein leygardagin og ein sunnudagin. Haraftrat hevði ein persónur sovið rúsin av sær í klivanum. Umframt hetta varð eisini boðað frá, at gøtuóskil varð í Magnus Heinasonargøtu, tá 10 mans fór upp at skeldast. Politiið fekk tosað mennirnar til rættis, og so hendi ikki meir.

## Grindaboð í Klaksvík

LØGREGLUTÍÐINDI
*Hans Kárason Mikkelsen*

Løgreglan í Klaksvík hevði ikki nógv at gera um vikuskiftið. Onkur fullur persónur bleiv koyrdur til húsa av løgregluni, og húsaófriður varð í einum húsum fríggjadagin, men trupulleikarnir vóru loystir beinanvegin. Og fríggjakvøldið vóru grindaboð í Klaksvík, har ein lítil flokkur av springarum varð sæddur, men klaksvíkingar avgjørdu onki at gera.

Náttina til leygardagin vóru tvey full fólk koyrd til húsa, og herverk varð framt á tveir bilar. Náttina til sunnudagin varð púra friðarligt í Klaksvík og somuleiðis sunnudagin.

## Herverk í Fuglafirði

LØGREGLUTÍÐINDI
*Hans Kárason Mikkelsen*

Beint undan skúlabyrjan hevði onkur brotið 10 rútar í skúlanum í Fuglafirði. Løgreglan í Runavík letur Sosialin vita, at onkur smávegis slóð er at ganga eftir. Annars varð tað eitt friðarligt vikuskiftið í Eysturoynni. Fríggjadagin hendi onki, og leygardagin siga tey, at onkur smáting vóru at taka sær av. Full fólk vóru ófriðarlig til Frændur-dansin í Fuglafirði, men ongar handtøkur vóru. Og eitt smávegis ferðsluóhapp varð, tá ein bilur fór út av við Toftavatn, men ongin persónsskaði stóðst av hesum.

# Fyll tangan - hugsa positivt !!!!

**Tíðindaskriv**

Nú er hann aftur her, Carsten Sommerskov - maðurin sum hevur bergtikið hundratals føroyingar, og sum kann læra eitt og hvørt menniskja at verða meira positivt.

Í hesum landi eru nokk av menniskjum, sum eru negativ - og er tað lætt at fella í hesa grøvina. Tí er tað umráðandi, at læra seg at brúka heilan rætt, so ikki tann negativi parturin av heilanum vinnur á tí positiva.

At hugsa positvit, skapar eitt betur arbeiðsumhvørvið og har við eitt betur arbeiðspláss. Eisini í tí privata lívinum gongur alt lættari og betur við at hugsa positivt.

Skeiðini eru til vaskikonuna, skrivstovumannin, flakakvinnuna, stjóran - jú øll hava gott av at hugsa positivt.

**Skeiðini verða á:**

Hotel Føroyum týsdagin 9. september - kl. 19.00 til 22.00.

Kappróðrarneystinum á Glyvrum mikudagin 10. september - kl. 19.00 til 22.00.

Og á Hotel Øravík hósdagin 11. september - kl. 19.00 til 22.00.

Skeiðini kosta Kr. 860,- + mvg fyri hvønn luttakarara. Við í prísinum er bókin »Surfing på toppen af livet" og ábit í steðginum.

Um fyritøkur hava áhuga at fáa Carsten Sommerskov inn á teirra arbeiðspláss, so kann hann halda privat skeið fyri øllum arbeiðsfólkunum á sjálvari fyritøkuni. Av tí at undirtøkan sær út til at blíva stór, er tað avmarkað, hvussu nógv kunnu koma á hvørt skeiðið.

Vilja tit hava meira at vita, eru tit vælkomin at seta tykkum í samband við okkum, ella vitja heimasíðuna www.sommerskov.dk






# Vágatunnilin liðugur um tríggjar vikur

**Tann 8. september verður arbeiðið upp á Vágatunnilin endaliga liðugt. Tá verður koyrandi allan sólarringin**

VÁGATUNNILIN
*Edvard Joensen*

**Vágar:** Um tríggjar vikur verður koyrandi óhindrað gjøgnum Vágatunnnulin alt samdøgurðið, sigur Niklas Foldbo, verkfrøðingur hjá Vágatunlinum.

Arbeitt hevur verið mestsum alla tíðina, síðan tunnilin lat upp í fjør, við at gera ymiskt smátt, sum manglaði, endaliga liðugt.

Serliga hevur tað verið at sprænt betong undir loftið í tunlinum, sigur Niklas Foldbo. Slíkt, sum ikki var endaliga gjørt liðugt, og okkurt, sum ymsir smáskaðar eru komnir uppá, meðan arbeitt hevur verið í seinna umfari.

At tað ikki hevur gingið so skjótt, sum onkur kundi hugsað sær, kemst av, sigur hann, at tað verður arbeitt við smáum maskinum, sum ikki eru so effektivar, sum tær størru. Hetta hevur tí tikið sína tíð. Men nú hevur leiðslan fyri Vágatunnilin fingið lovað frá teimum, sum gera arbeiðið, at 8. september er endaliga liðugt, og so verður koyrandi uttan hindring alt samdøgurðið.

Fólk, sum hava ferðast gjøgnum Vágatunnilin í summar, hava lagt merki til, at veggirnir í tunlinum hava verið heldur vátari, enn teir vóru fyrstu tíðina, tunnilin var opin.



*Arbeiðstakarin, sum ger arbeiðið í Vágatunlinum, hevur lovað leiðsluni fyri Vágatunnilin, at tann 8. september verður alt liðugt, og tunnilin opin alt samdøgurðið*

Ymsar hugsanir hava fólk gjørt sær um tað, og fleiri eru, sum hava hildið, at nú fara nýggir lekar at vísa seg.

Men soleiðis er ikki, greiðir Niklas Foldbo frá. Talan er um kondens, sum legst á veggirnar orsakað av lýkkuni, sum hevur verið í summar.

– Tað er stutt og greitt lýggja veðrið, vit hava havt í summar, sum ger, at veggirnir eru vátir. Lýggja luftin, sum kemur inn í kaldara tunnilin, fordampar og legst sum væta á veggirnar. Hetta fer at hvørva aftur, tá kaldari verður í veðrinum aftur.

Um lekar sigur Nilklas Foldbo, at tað, sum tey hava skrásett higartil, síðan borað varð ígjøgnum, er, at tað lekur bara soleiðis umleiðis ein triðing av tí, lagt varð upp fyri. So lekar eru als eingin trupulleiki í løtuni, og nýggir lekar eru ikki staðfestir, sigur hann.

– Tað er lætt at kanna eftir, hvussu til stendur við tí. Tað síggja vit á nøgdini, sum pumpað verður úr uppsamslingsbrunninum, sigur Niklas Foldbo, verkfrøðingur hjá Vágatunlinum.

# Útnorðurráðið á Eiði

**Í farnu viku hevði Útnorðurráðið fund á Eiði, har bæði tíðin, sum farin er og komandi tíð við sínum ætlanum vórðu viðgjørdar**

RÁÐSFUNDUR
*Edvard Joensen*

Útnorðurráðið hevði fund á Eiði í fanru viku. Viðgjørt varð millum annað mál ráðsins um tættari samstarv millum heilsuverkini í Útnorðurlondunum, eins og eisini varð komið inn á temaðið fyri komandi ár, sum verður um orka.

Ráðsfundurin hjá Útnorðurráðnum viðgjørdi temaðið fyri 2003, sum er um samstarv millum heilsumyndugleikarnar í londunum í Útnorði.

Útnorðurráðið sigur tí tíðindaskrivi, sum sent varð um vikuskiftið, at endamálið við ráðstevnuni var at lýsa tey vandamál, sum eru á heilsuøkinum í Útnorðurlondunum og leggja upp til størri samstarv á hesum økjunum í londunum.

Útnorðurráðið kom við einum tilmæli til tilráðing til stjórn og landsstýri í Útnorðurlondunum um at aðalráð, landsstýrismenn og ráðharrar á økinum áseta fastar rammur fyri samstarvinum á heilsuøkinum í londunum.

Grønlendski landstingsformaðurin, Jonathan Motzfeldt, tekur við formansstarvinum í Útnorðurráðnum eftir Jógvan á Lakjuni, løgtingsmann.

Jonathan Motzfeldt legði fram virkirætlan fyri komandi ár. Hendan ætlanin leggur serliga dent á viðurskifti Útnorðurs við ES, eins og dentur verður lagdur á samstarv millum Útnorðurráðið og Arktisku Parlamentarisku Nevndina.

Eisini verður stórur dentur lagdur á burðardygt at gagnnýta livandi tilfeingið í Norðuratlantshavi. Hetta kom serliga fram í eini áheitan á stjórnirnar í útnorðurlondunum um at styrkja samstarvið landanna millum við atliti at framhaldandi at gagnnýta felags fiskastovnarnar í Norðurhøvum.

Undir aðalorðaskiftinum varð dentur lagdur á at styrkja samskiftið millum fiskimenn, vísindafólk og politikarar, eins og víst varð á týdningin av, at politikarar kenna teirra ábyrgd í hesum sambandi.

Temaið fyri komandi ár er orka. Hetta er stórt evni, sum krevur miðvíst samstarv millum Útnorðurráðið og ráðharrastovur og aðalráð í ymsu londunum, eins og tað eisini krevur samstarv við avvarðandi serfrøðingar og fakfólk, sigur Útnoðrurráðið í tíðindaskrivinum.

Á fundinum hjá útnorðurráðnum luttók eisini norski stórtingsformaðurin, Jørgen Kosmo, sum millum annað helt eina røðu, har hann tossði um Útnorður við norskari luttøku.



*Jonathan Motzfeldt hevur tikið yvir sum formaður í Útnoðurráðnum eftir Jógvan á Lakjuni*
*Mynd: Edvard Joensen*